# Eysturoyggin líkist sær sjálvari

**Einki bendir á, at valdømisvaldu tingmenninir ikki skulu koma úr somu flokkum, sum teir við einum undantaki hava gjørt síðani í 1978, og einki bendir á, at valdømið aftur hesa ferð sammett við fólkatalið fer at eiga minstu umboðanina í tinginum**



*Eysturoyggin líkist sær sjálvari, soleiðis sum hon hevur gjørt seinastu fjórðings øldina*

EYSTUROYAR VALDØMI
*Jóannes Hansen*

Sambandsflokkurin eigur tveir, og Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eiga hvør sín valdømisvalda tingmannin. Soleiðis hevur tað verið í Eysturoyar valdømi, síðani vallógin varð broytt undan løgtingsvalinum í 1978, tá ið tingmannatalið hjá Eysturoy fór úr fýra og upp í fimm. Eittans undantakið hevur verið. Tað var á kreppuvalinum í 1994, tá ið Javnaðarflokkurin misti mannin til Óla Jacobsen og Verkamannafylkingina.

Veljarakanningin hóskvøldið bendir á, at býtið av umboðum millum flokkarnar í Eysturoy verður tað sama, sum tað hevur verið. Kanningin bendir á, at talan kortini kann gerast um broytingar í styrkini. Sambandsflokkurin er størstur. Tað hevur hann verið mest sum hvørja ferð tey hundrað árini síðani floksbýtið. Undantøkini hava verið tvey. Tað fyrra var í 1945, tá ið tað var Fólkaflokkurin, sum var størstur, og tað seinna var í 1954, tá ið Tjóðveldisflokkurin varð størstur.

Á valinum í 2002 var Tjóðveldisflokkurin størstur aftaná Sambandsflokkin. Tað tykist Tjóðveldisflokkurin ikki at skula gerast hesa ferð. Tjóðveldisflokkurin missir 4,5 % og dettur niður á fjórða plássið, meðan bæði Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin hava framgongd.

Tjóðveldisflokkurin hevur afturgongd kring alt landið. Í Eysturoy er hon ikki størri, enn hon er aðra staðni. Men tað man kortini vera lítið at ivast í, at ein av høvuðsorsøkunum til væntaðu afturgongdina í næststørsta valdøminum er turbolensurin, sum hevur staðist av, at Signar á Brúnni ikki er á listanum. Tað verður mett, at tjóðveldisatkvøðurnar í Fuglafirði fara ikki at roynast so væl hesa ferð, sum tær hava gjørt á undanfarnu valunum. Fyri tveimum árum síðani var Signar á Brúnni ikki á listanum. Tá tók hann seg aftur, og Hallbjørg Hansen, sum hevði verið býráðsformaður, var á listanum. Tjóðveldisflokkurin í Fuglafirði kom hampuliga væl burturúr valinum.

Hesa ferð høvdu fuglfirðingar Signar á Brúnni í uppskoti. Hann vann ikki á listan, og tað verður mett at fara at kosta tjóðveldisatkvøður í Fuglafirði og harvið afturgongd í valdøminum. Tað kann væl hugsast, at tjóðveldismyndin í Eysturoy hevði sæð øðrvísi út, um Signar á Brúnni og Tórbjørn Jacobsen hesa ferð høvdu verið í iannanhýsis kapping um tjóðveldissessin, sum hóast turbolensin tykist rættuliga tryggur.

### Minstu umboðanina

Sammett við fólkatalið er Eysturoyar valdømi annað av tveimum valdømum, sum eigur minstu valdømisvaldu umboðanina. Hitt valdømið er Suðurstreymoy, sum við sínum átta valdømisvaldu tingmonnum er lutfalsliga eitt sindur verri fyri, enn Eysturoy er tað.

Men meðan Suðurstreymoy mest sum hvørja ferð og eftir øllum sólarmerkjum eisini hesa ferð fær fleiri eykavaldar tingmenn, so gongst tað ofta illa hjá Eysturoy at vinna eykavaldar tingmenn, og hetta valið tykist ikki at skula gerast nakað undantak.

Í níti árunum hava tingmenn fyri Sjálvstýrisflokkin, Kristiliga Fólkaflokkin, Framsóknarflokkin og Miðflokkin verið eykavaldir í Eysturoy. Síðsta valskeiðið hevur Sjálvstýrisflokkurin átt sætta tingmannin úr Eysturoy. Kanningin hóskvøldið bendir á, at tað fer at verða rættuliga tætt millum tølini hjá Sjálvstýrisflokkinum í Eysturoy og Suðurstreymoy.

### Framvegis kapping millum bygdir

Á so nógvum av undanfarnu valunum hevur tað verið stór innanhýsis kapping í flokkunum. Fleiri bygdir í valdøminum eru so mikið stórar, at tær megna at vera við í kappingini um tingmenninar. Næstsíðsta valskeið átti Fuglafjørður tríggjar av fimm valdømisvaldum tingmonnum. Í hesum valskeiðnum hava fuglfirðingar verið umboðaðir av Jógvani á Lakjuni úr Fólkaflokkinum. Signar á Brúnni var ikki á listanum fyri tveimum árum síðani, og javnaðartingmaðurin flutti úr Fuglafirði og til Gøtu, har Andreas Petersen varð valdur. Nú bjóðar Dan R. Petersen seg fram aftur.

Toftir hava mest sum hvørja ferð í hálvt hundrað ár átt sambandsmann. Soleiðis var tað eisini fyri tveimum árum síðani, tá ið Alfred Olsen varð fyrstvaldur í valdøminum. Hin tingmaðurin hjá Sambandsflokkinum er fyrrverandi løgmaðurin, Edmund Joensen, tingformaður, sum seinast fekk flestu persónligu atkvøðurnar í Sundalagnum og norður til Eiðis.

Tórbjørn Jacobsen varð sannførandi valdur fyri Tjóðveldisflokkin í 2002. Hóast hann hevur fingið Hans Tausen Olsen ímóti sær í Runavíkar kommunu, so man tað vera lítið sannlíkt, at nakar skal hótta fólkatingsmannin. Olaf í Garði Joensen á Eiði hevur verið roknaður sum besta boðið upp á næstfemsta plássið.

Á fólkaflokslistanum hevði Jógvan á Lakjuni nógv flestar persónligar atkvøður í 2002. Tummas í Garði hevði næstflestar, og uppstillingin á vestara armi á Skálafjørðinum kundi bent á, at strandingurin, sum býr í høvuðsstaðnum, aftur hesa ferð fór at verða drúgvur.

# Páll stavn um stavn við Fólkaflokkin

**Javnaðarflokkurin í Sandoynni varðveitir sína undirtøku, meðan stóra afturgongdin hjá Tjóðveldisflokkinum og framgongdin hjá Fólkaflokkinum bera við sær, at Fólkaflokkurin hevur góðar møguleikar at endurvinna umboðanina, sum teir síðst mistu til Tjóðveldisflokkin**



*Páll á Reynatúgvu tók sessin frá Fólkaflokkinum við seinasta val, men líkt er til, at tað fer at standa á at endurvinna hendan*

SANDOYAR VALDØMI
*Jóannes Hansen*

Tað er ovurstórur spenningur um valið í Sandoyar valdømi. Í minsta valdøminum telur hvør einstøk atkvøða lutfalsliga meiri, enn hon ger nakra aðra staðni. At heilt fáar atkvøður verða fluttar millum flokkar, sum eru í tættari kapping um ein sess í løgtinginum, kann hava avgerandi týdning fyri úrslitið. Veljarakanningin hóskvøldið bendir á, at tað verður stríðið í hesi vikuni um heilt fáar atkvøður í Sandoyar valdømi, sum fara at gera av, hvør skal umboða valdømi í nýggja løgtinginum.

Sandoyar valdømi verður roknað sum lyklavaldømi. Serliga tá ið tað er stórt trýst á eykamonnunum, soleiðis sum tað tykist skula vera hesa ferð, er tað sera týdningarmikið at hava ognað sær ein valdømisvaldan tingmann í hesum valdøminum, har tað skulu færri atkvøður enn nakra aðra staðni til at fáa valdømisvalt umboð.

Javnaðarflokkurin var størstur á valinum fyri tveimum árum síðani, og sambært kanningini verður hann aftur størstur hesa ferð. Javnaðarflokkurin fær 34,4% og harvið størri undirtøku enn seinast. Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin vóru í kanningini stavn um stavn í kappingini um seinna Sandoyar tingmannin: Fólkaflokkurin 23,9% og Tjóðveldisflokkurin 23,5 %. Tá ið hagtalsliga óvissan í sovorðnari kanning verður tikin við, so er at staðfesta, at flokkarnir eru púra javnir.

Tjóðveldisflokkurin við landsstýrismanninum Pálli á Reynatúgvu sum høvuðsvalevni hevur sammett við valið í 2002 mist 5,7 %, og Fólkaflokkurin hevur vunnið 2,7 %.

Ofta hava tvær og tríggjar atkvøður verið á muni millum umboðan og ikki umboðan í Sandoyar valdømi. Kanningin hóskvøldið bendir á, at soleiðis verður tað eisini hesa ferð.

Tá ið tað er so tætt í kapping, er tað meiri enn so komið fyri, at harða kappingin gongur út yvir onkran annan. Tí er tað ivaleyst soleiðis, at Javnaðarflokkurin í Sandoyar valdømi ikki kennir seg heilt tryggan, men tað skal vilja illa til hjá teimum, um sessurin, sum Gerhard Lognberg hevur røkt stutta valskeiðið, ikki verður endurvunnin.

Eins og alla aðra staðni kring landið, tykist Sambandsflokkurin at fáa betri val í Sandoyar valdømi hesa ferð, enn hann hevði seinast. Men Sandoyar valdømi má roknast sum einasta valdømið, har Sambandsflokkurin ikki tykist hava stórvegis møguleika at vinna sær valdømisvaldan tingmann. Higartil hevur tað ongantíð eydnast Sambandsflokkinum at vinna sær umboðan í Sandoyar valdømi.

# Greitt ynski um heimastýrissamgonguna

**Formaðurin í Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen heldur, at veljarakanningin kann tulkast sum, at føroyski veljarin ynskir eina heimastýrissamgongu millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin.**



*Lisbeth L. Petersen er sjálvsagt ómetaliga fegin um góða úrslitið í veljarakanningini, Hon heldur at kanningin kann tulkast sum eitt ynski frá føroyska veljaranum um eina tvey flokka samgongu millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin*

VELJARAKANNING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Hatta ljóðar ótrúliga gott, ja heilt einastandi. Formaðurin Sambandsflokkinum er ómetaliga fegin um góða úrslitið hjá Sambandsflokkinum í veljarakanningini. Hon er kortini skjót at leggja afturat, at veljarakanningin má fyri alt ikki enda sum ein koddi hjá Sambandsflokkinum, nú ein góð vika restar í til valið.

– Eg eri sjálvsagt ótrúliga glað, men kanningin kann eisini gerast farlig, tí fólk fara nú møguliga hugsa, at teirra atkvøða nýtist ikki at fara til sambandsflokkin, tí flokkurin sær út til at klára seg uttan. Hetta mugu vit syrgja fyri at ikki hendur, sigur formaður Sambandsfloksins

Lisbeth L. Petersen sigur, at alla hennara tíð í føroyskum politikki hevur Sambandsflokkurin ikki havt fleiri enn átta tingmenn og at talið er komið upp á tíggju er heilt ótrúligt og bara fegnast um.

### Heimastýrissamgonga

Sambært veljarakanningini hava Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin einsmallir meiriluta í løgtinginum. Møguleiki er so fyri fyrstu tvey flokka samgonguni síðan 1990. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava søguliga samstarvað í sonevndum heimasstýrissamgongum. Formaðurin í Sambandsflokkin heldur, at veljarakannigin er eitt varskó frá føroyska veljaranum til eitt samgongusamstarv við Javnaðarflokkin.

– Vit hava somu støðu til ríkisrættarliga spurningin og á sosiala økinum kunnu flokkarnir eisini samstarva. Vit hava eisini arbeitt væl saman sum andstøðu Kanningin er eitt týðuligt signal um, at veljarin ynskir eina broyting og sum tølini eru nú, kann eitt samstarv við Javnaðarflokkin væl koma upp á tal.. Hetta betýðir kortini ikki, at Sambandsflokkurin ikki er áhugaður at tosa við aðrar flokkar um samgongur, vísir Lisbeth L. Petersen á.

Hon leggur afturat, at ein tveyflokka samgonga er lættari at samskipa enn ein samgongu fleiri flokkum. Smáu flokkarnir eru vanliga avgerandi og teir stilla stór krøv. Eitt samstarv við Javnaðarflokkin kundi tí verið ein góður møguleiki, sigur hon

### Politikkur og ónøgd

Spurd um hví Sambandsflokkurin áhaldandi fær so góð úrslit í veljarakanningunum, svarar Lisbeth, at tað er samantvinning av førda politikkinum hjá flokkinum og ein stór ónøgd við avrikini hjá undanfarnu samgongu.

# Eitt spark í dintilin

**Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, heldur, at stóra veljarakanningin fyrst og fremst er eitt týðiligt varskó til øll fullveldisfólk í Føroyum. Hann er framvegis optimistiskur, men ásannar, at Tjóðveldisflokkurin og fullveldisvongurin ikki longur hava tann stuðul millum veljararnar, sum teir hava havt**



*Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, heldur, at veljarakanningin eigur at vera eitt spark í dintilin hjá øllum fullveldisfólkum*

*Mynd: Savnsmynd*

VELJARAKANNING
*Kristian E. Andersen*

– Eg tulki fyrst og fremst hesa veljarakanningina sum eitt týðiligt varskó til øll fullveldisfólk í Føroyum. Kanningin er ein staðfesting av, at tað hevur eydnast sambandskreftunum í Føroyum at fáa føroyingar at síggja framtíðina og tað føroyska samfelagið í einum negativum ljósi. Tí eigur hendan kanning at vera eitt spark í dintilin hjá øllum fullveldissinnaðum fólki í Føroyum, er fyrsta viðmerkingin hjá formanni Tjóðveldisfloksins, Høgna Hoydal, til nýggju veljarakanningina, sum Fynd og Sosialurin hava gjørt í samstarvi við Føroya Tele.

### Døpur framtíðarútlit

Formaður Tjóðveldisfloksins lýsir eina, fyri Tjóðveldisflokkin, dapra mynd av føroyska samfelagnum, um Sambandsflokkurin vinnur valið.

– Sambandsflokkurin hevur greitt boðað frá, at hann fer til Danmarkar at samráðast um at lima okkum endaliga inn í danska ríkið og ES. Umframt hetta hevur sambandsflokkurin eisini boðað frá, at hann fer at veita skattalætta til tey ríkastu. Úrslitið av hesum verður so, at vit um fá ár, tá landsskassin ikki longur megnar at bera sína byrðu, aftur mugu fara á biddaragongd á Christiansborg, greiðir Høgni Hoydal frá.

### Framvegis optimistiskur

Hóast Høgni Hoydal viðurkennir úrslitið av veljarakanningi og ásannar, at veljarin ikki longur stuðlar Tjóðveldisflokkinum, sum hann hevur gjørt, er hann framvegis optimistiskur og hevur enn ikki mist vónina.

– Eg havi sagt síðan valstríðið byrjaði, at tað er í mótburði, at mann skal vísa sína styrki, og eg havi tað sannføring, at tað fer at eydnast at fáa framtíðina á skránna áðrenn valið. Eg vænti ikki, at føroyski veljarin fer at siga nei til framtíðina og sítt egna land, tá hann fer inn í atkvøðuboksina, sigur formaður Tjóðveldisfloksins at enda.

Jóannes Eidesgaard:

# Ótrúliga gott úrslit



*Jóannes Eidesgaard er ógvulig fegin um úrslitið av veljarakanningini, og hann heldur eina samgongu við Sambandsflokkin vera ein greiðan møguleika*

**– Fyri Javnaðarflokkin er úrslitið av hesari veljarakanningini ótrúliga gott, og fyri andstøðuna er hetta eitt uppaftur betri úrslit, sigur Jóannes Eidesgaard.**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

22,1% av atkvøðunum og átta tingmenn er úrtøkan hjá Javnaðarflokkinum í nýggju og umfatandi veljarakanningini hjá Sosialinum og Fynd í samstarvi við Føroya Tele.

Og Jóannes Eidesgaard er eisini sera væl nøgdur við úrtøkuna í Veljarakanningini.

– Fyri Javnaðarflokkin er úrslitið av hesari veljarakanningini ótrúliga gott, og fyri andstøðuna er hetta eitt uppaftur betri úrslit. Eg síggi hetta sum ein dyggur frammaná til samgonguna, sigur Jóannes Eidesgaard.

Eins og forkvinnan í Sambandsflokkinum heldur eisini leiðarin hjá javnaðarfólki, at eitt tílíkt úrslit vísir vegin til, at núverandi andstøða eftir valið 20. januar fer at gerast samgonga.

– Tað er týðuligt, at veljarin ynskir eina broyting í landsins leiðslu, sigur Jóannes Eidesgaard, sum eisini vísir á, at eitt samgongusamstarv millum bert tveir flokkar eru ólíka nógv lættari enn um fleiri flokkar skulu til fyri at fáa kabalina at ganga upp.

Jóannes Eidesgaard sigur seg sakna eitt greitt útspæl frá Sambandsflokkinum viðvíkjandi hvørja samgongu flokkurin miðjar ímóti. Í øllum førum sær formaður Javnaðarfloksins góðar møguleikar fyri einum samstarvi millum verandi andstøðuflokkar.

### Endaspurtur

Javnaðarflokkurin er ikki so langt frá níggju tingmonnum í veljarakanningini. Eitt nú er flokkurin stutt frá einum tingmanni í Vágoynni.

– Hendan veljarakanningin eigur at vísa okkum í flokkinum, at her er nakað at berjast fyri, sigur Jóannes Eidesgaard avgjørdur. Hann heldur, at ein góður og dugnaligur endaspurtur gera eina góða veljarakanning til eitt frálíkt úrslit.

– Javnaðarflokkurin hevur ligið stútt í teimum seinastu veljarakanningunum, og vit tykjast at hava staðfest eina støðu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at tað fyrst og fremst er ynski um eina broyting í landsins viðurskiftum, sum góða úrslitið í veljarakanningini.